# VIÐTØKUR

**fyri**

## Suðuroyar Sparikassa P/F

(Sum seinast broyttar á ársaðalfundi 21. mars 2018 og í sambandi við avgerð um kapitalhækking tikin á nevndarfundi 19. desember 2018 og í sambandi við avgerð um kapitalhækking tikin á nevndarfundi 24. oktober 2019)

### Navn, heimstaður og endamál
### § 1.

**Stk. 1.**
Navn felagsins er Suðuroyar Sparikassi P/F. Felagið rekur eisini virksemi undir hjánøvnunum SPARSU P/F, Sbank P/F, Sbanki P/F, SNetbanki P/F, Netgreiðsla P/F, Suðbanki P/F, SSP P/F, Southbank P/F, SPARIBANKI P/F og Suðuroyar Banki P/F.

**Stk. 2.**
Heimstaður felagsins er Vágs kommuna og høvuðsskrivstova felagsins skal vera í Vágs kommunu.

**Stk. 3.**
Endamál felagsins er at reka peningastovnsvirksemi, og annað sambært peningastovnslóggávuni loyvt virksemi.

### Kapitalur og partabrøv
### § 2.

**Stk. 1.**
Partapeningur felagsins er kr. 57.008.000,00, býttur sundur í partabrøv á kr. 1.000,00 og multipla av hesum. Partapeningurin er allur inngoldin.

**Stk. 2.**
Partabrøvini skulu ljóða uppá navn og verða skrivað inn í partabrævabók felagsins. Nevnd felagsins kann taka avgerð um at skráseta partabrøvini í Værdipapircentralen ella øðrum tilsvarandi stovni.

Nevndin kann taka avgerð um at notera partabrøvini á einum virðisbrævamarknaði, harundir eisini á einum løggildum marknaði, í Føroyum ella uttanlands.

**Stk. 3.**
Partabrøvini kunnu ikki verða avhend til handhavara. Partabrøvini eru umfaraskjøl. Tann, ið ognar sær partabræv, kann ikki útinna tey rættindi, sum partaeigari hevur uttan so, at viðkomandi er skrásettur í partabrævabókini, ella hevur fráboðað og prógvað síni rættindi til partabrøvini. Hetta er tó ikki galdandi fyri vinningsbýti, aðrar útgjaldingar og rættin til nýggj partabrøv við hækking av partapeninginum.

**Stk. 4.**
Partabrøvini kunnu frítt verða avhend, sí tó § 5. Eingin partaeigari hevur skyldu at lata partabrøv síni innloysa fult ella lutvíst, sí tó § 5.

**§ 3.**

**Stk. 1.**
Nevndini er heimilað, í tíðarskeiðinum fram til 31. januar 2023, at hækka partapeningin - í einum ella fleiri umførum - við samanlagt kr. 13.100.000.
Hækkingin kann fara fram uttan fortekningsrætt fyri partaeigarar felagsins, um so er, at hækkingin fer fram við kontantum inngjaldi til marknaðarkurs, umlegging av skuld, ella sum viðurlag fyri yvirtøku felagsins av øðrum fyritøkum, ella ávísum ognarvirðum til eitt virði, ið mótsvarar virðinum á teimum útgivnu partabrøvunum. Undantikið hesum hava partaeigarar felagsins fortekningsrætt til tekning av nýggjum partabrøvum.

**Stk. 2.**
Umframt hækkingina sambært § 3, stk. 1, er nevndini heimilað, í tíðarskeiðinum fram til 31. januar 2023, at hækka partapeningin – í einum ella fleiri umførum – við samanlagt kr. 20.000.000,00. Partaeigarar felagsins skulu hava fortekningsrætt.

**Stk. 3.**
Teir nýggju partaeigararnir skulu við komandi hækkingum av partapeninginum hava sama fortekningsrætt sum verandi partaeigarar. Partabrøvini skulu vera umfaraskjøl, ljóða uppá navn og geva rætt til vinningsbýti og onnur rættindi at galda frá tí degi, sum nevndin avgerð, tó í seinasta lagi frá roknsskaparársbyrjan, árið eftir, at samtykt er at hækka partapeningin.

Tey nýggju partabrøvini skulu í aðra máta vera á jøvnum føti við eldru partabrøvini.

**Stk. 4.**
Nevndini er heimilað at gera tær í samband við hækkingina av partapeninginum neyðugu broytingar í viðtøkunum.

**Ábyrgdarlánikapitalur**
**§ 4.**

Nevndini er heimilað at lata felagið taka ímóti innskoti sum ábyrgdarlánikapital. Samlaði ábyrgdarlánikapitalurin kann ikki verða størri enn kr. 10.000.000,00.

Í tann mun ábyrgdarlánikapitalurin verður innfríaður, kann nevndin nýta heimildina av nýggjum.

Um felagið verður avtikið ella fer konkurs, fær ábyrgdarlánikapitalur fulnað áðrenn partaeigarar felagsins, men aftaná hinar kreditorar felagsins.

**Ognaravmarking**
**§ 5**

Eingin partaeigari kann uttan samtykki nevndarinnar eiga meira enn 10 % av partapeningi felagsins. Ein einstakur partaeigari kann í mesta lagi eiga 40 % av partapeningi felagsins.

Hesar avmarkingar eru ikki galdandi fyri Suðuroyargrunnin.

Somuleiðis er ein í samráð við Fíggjareftirliti framd umskipan av felagnum eftir kapitaltap, ikki fevnd av omanfyri nevndu avmarkingum.

**Stk. 2.**
Partabrøv, sum sambært skráseting í partabrævabók felagsins tilhoyra ymiskum eigarum, eru hvat viðvíkur stk. 1, at meta sum tilhoyrandi einum partaeigara um so er, at tað millum eigararnar er eitt sovorðið serligt samband, at útinnanin av atkvøðurættinum til partabrøvini, má metast at vera avgjørd av sama áhugabólki, harundir í føri, har eigararnir gjøgnum partabrævaogn ella á annan hátt eru knýttir at eini felags konsern ella øðrum áhugafelagsskapi.

**Stk. 3.**
Um farið verður uppum ásetingarnar í stk. 1, hevur partaeigarin skyldu til, innan 4 vikur eftir at ákrav er sett fram um tað, at avhenda tann partin, ið er omanfyri markið. Um partaeigarin ikki ger eftir ákravinum, áðrenn freistin er farin, hevur felagið rætt at innloysa partin omanfyri markið til kurs 100, ella til tann til hvørja tíð noteraða kurs, um hann er lægri enn 100.

**Stk. 4.**
Er talan um eina støðu, ið er fevnd av stk. 2, og eigararnir ikki semjast um, hvørt partabrøv skulu innloysast eftir stk. 3, hevur felagið rætt til at innloysa partin omanfyri markið við teimum seinast ognaðu partabrøvunum.

**Leiðsla felagsins**

**§ 6.**

Felagið verður stýrt av einum aðalfundi, nevnd og stjórn.

**Aðalfundurin**

**§ 7.**

Aðalfundurin er hægsti myndugleiki felagsins.

**§ 8.**

**Stk. 1.**
Aðalfundurin verður hildin í Vági eftir avgerð nevndarinnar. Nevndin boðar til aðalfundar við kunngerð í einum ella fleiri av teimum føroysku bløðunum og skrivliga til teir í partabrævabókini skrásettu partaeigararnar, sum hava biðið um tað.

**Stk. 2.**
Fundarboðini, ið skulu innihalda fundarskrá fyri aðalfundin, skulu gevast í fyrsta lagi 4 vikur og í seinasta lagi 2 vikur fyri aðalfundin. Um uppskot skulu viðgerast, ið krevja kvalifiseraðan meiriluta fyri at verða samtykt, skal hetta verða tilskilað ásýniligt í fundarboðunum.

**Stk. 3.**
Ein og hvør partaeigari hevur rætt til at fáa eitt ávíst evni sett á dagskránna á vanliga aðalfundinum sbr. tó annað og triðja punktum. Verður kravið herum sett fram í seinasta lagi 6 vikur fyri, at aðalfundurin skal haldast, hevur partaeigarin rætt til at fáa evnið við á dagskránna. Fær felagið kravið seinri enn 6 vikur fyri at aðalfundurin verður hildin, ger nevndin av, um kravið er sett fram í so góðari tíð, at evnið kann verða sett á dagskránna.

**Stk. 4.**
Í seinasta lagi 2 vikur frammanundan hvørjum aðalfundi verður at leggja fram á høvuðsskrivstovu felagsins, til eftirlit fyri partaeigararnar dagsskrá og fullfíggjað uppskot, ið ætlandi skulu leggjast fram á aðalfundinum, og hvat tí vanliga aðalfundinum viðvíkur, eisini ársroknskapur við grannskoðaraátekning og ársfrágreiðing.

## § 9.

Boðast skal til eykaaðalfundar eftir avgerð av aðalfundinum, nevndini ella einum aðalfundarvaldum grannskoðara, ella til viðgerðar av einum ávísum tilskilaðum evni eftir kravi frá partaeigarum, sum eiga í minsta lagi 5 % av partapeninginum. Boðast skal til eykaaðalfundar innan 14 dagar eftir, at krav er sett fram um tað.

## § 10.

Dagsskráin fyri vanliga aðalfundin, sum skal haldast innan apríl mánaður er farin, skal fevna um:

1. Frágreiðing frá nevndini um virki felagsins í farna ári.
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar.
3. Avgerð um nýtslu av yvirskoti ella rindan av halli sambært góðkenda roknskapinum.
4. Fráboðan frá Suðuroyargrunninum viðvíkjandi rætti grunsins at tilnevna ein nevndarlim sambært § 14.
5. Val av nevndarlimum.
6. Val av grannskoðan.
7. Møgulig uppskot frá nevnd ella partaeigarum.
8. Ymiskt.

## § 11.

Aðalfundurin verður stjórnaður av einum av nevndini tilnevndan fundarstjóra, ið tekur avgerð í øllum spurningum viðvíkjandi málsviðgerð, atkvøðugreiðslu og úrslit tess, harundir eisini møguligum spurningum í samband við § 5, stk. 2.

## § 12.

**Stk. 1.**
Umframt umboð fyri fjølmiðlarnar, hevur ein og hvør partaeigari ella fulltrúi rætt til at møta á aðalfundinum, um viðkomandi í seinasta lagi 3 dagar undan aðalfundinum hava boðað felagnum frá luttøku.

Rætturin hjá einstøku partaeigarum felagsins til at luttaka á aðalfundi og at greiða atkvøðu í sambandi við partabrøv síni verður ásettur í mun til tey partabrøv, sum viðkomandi partaeigarar eiga skrásetingardagin. Skrásetingardagurin er 1 vika, áðrenn aðalfundurin verður hildin. Vísandi til § 84, stk. 3, í vinnufelagslógini, eru § 84, stk. 1 og 2, galdandi.

**Stk. 2.**
Eitt partabræv á kr. 1.000,00 gevur eina atkvøðu.

**§ 13.**

**Stk. 1.**
Á aðalfundinum verða øll mál avgjørd við vanligum atkvøðumeiriluta, uttan so at lóggávan ella hesar viðtøkur áseta annað.

**Stk. 2.**
Til at samtykkja avgerð um broytingar av viðtøkunum ella avtøku av felagnum krevst tó, at uppskotið verður samtykt við 2/3 av bæði greiddum atkvøðum og tí á aðalfundinum samlaða umboðaða partapeninginum, eisini partabrøv omanfyri ognaravmarkingina í § 5. Við útrokning av tí umboðaða partapeninginum, verða tó ikki tikin við partabrøv, sum ikki eru skrásett uppá navn.

**Stk. 3.**
Um tað, sum fer fram á aðalfundinum, verður førd gerðabók, ið fundarstjórin skrivar undir.

**Nevndin**
**§ 14.**

**Stk. 1.**
Í nevndini eru 4 – 6 limir, harav Suðuroyargrunnurin hevur rætt til at tilnevna ein lim, meðan hinir verða valdir av aðalfundinum. Afturat hesum koma teir limir, ið lóggávan annars ásetur.

**Stk. 2.**
Teir av aðalfundinum valdu nevndarlimirnir, verða valdir fyri 3 ár í senn. Fer nevndarlimur frá í valskeiðinum, verður nýggi nevndarlimurin valdur fyri tað, sum er eftir av valskeiðinum. Afturval er loyvt.

**§ 15.**

**Stk. 1.**
Nevndin skipar seg eftir aðalfundin og velur ein formann og ein næstformann. Næstformaðurin kemur á einhvønn hátt í formansins stað, tá hesin ikki kann útinna starv sítt.

**Stk. 2.**
Nevndin er viðtøkufør, tá ið meirilutin av nevndarlimunum er á fundi, og avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta. Stendur á jøvnum, er atkvøða formansins avgerandi.

**Stk. 3.**
Um tað, sum fer fram á fundi í nevndini, verður førd gerðabók, sum verður undirskrivað av nevndarlimunum.

**Stk. 4.**
Grannskoðaragerðabókin verður framløgd á hvørjum nevndarfundi, og hvør tilførsla verður undirskrivað av øllum nevndarlimum.

**Stk. 5.**
Nevndin ásetur í eini starvsskipan gjøllari reglur um útinnan av sínum starvi.

## Stjórnin
## § 16.

**Stk. 1.**
Til at taka sær av dagligu leiðsluni í felagnum setur nevndin eina stjórn, sum hevur 1 – 2 stjórnarlimir. Setanartreytir fyri stjórnina verða ásettar í sáttmála millum stjórnina og nevndina.

**Stk. 2.**
Stjórnin stýrir dagliga virki felagsins, harundir setan og uppsøgn av starvsfólkum felagsins, og nevndin ger yvirskipaðar reglur og ásetur meginreglurnar fyri virkisútinnanina.

**Stk. 3.**
Nevndin ásetur í eini instruks, í hvønn mun tað krevst, at nevndin luttekur fyri at játta lán, kredittir, garantiir og møguliga aðrar skyldur.

## Ábyrgdarar
## § 17.

Ábyrgdararnir í Suðuroyar Sparikassa hava fingið rætt til at skifta teirra ábyrgdarfæ til partabrøv. Teir ábyrgdarar, sum ikki hava ynskt at fingið teirra innistandandi ábyrgdarfæ útgoldið kontant, kunnu halda fram sum ábyrgdarar til 31. desember 2010, og verður innistandandi ábyrgdarfæið rentað sambært higartil galdandi viðtøkum sparikassans. Víst verður til skiftisreglurnar í § 21.

**Tekningarreglur**
**§ 18.**

**Stk. 1.**
Felagið verður teknað av formanninum ella næstformanninum í nevndini saman við einum øðrum nevndarlimi ella einum stjóra, ella av tveimum stjórnarlimum saman.

**Stk. 2.**
Nevndin kann veita felags prokura og serfulltrú.

**Grannskoðan**
**§ 19.**

Roknskapir felagsins verða grannskoðaðir av einum av aðalfundinum valdum løggildum grannskoðara. Grannskoðarin verður valdur fyri eitt ár í senn.

**Roknskaparár**
**§ 20.**

Roknskaparár felagsins er álmanakkaárið.

**Skiftisreglur**
**§ 21.**

**Stk. 1.**
Ábyrgdarar hava í tíðarskeiðinum fram til 31. desember 2010 rætt at skifta ábyrgdarfæið til partabrøv í Suðuroyar Sparikassa P/F til marknaðarkurs, ella at lata ábyrgdarfæið innloysa kontant.

**Stk. 2.**
Rætturin sambært stk. 1 at skifta ábyrgdarfæ til partabrøv, kann einans nýtast, um alt ábyrgdarfæið hjá viðkomandi ábyrgdara verður umbýtt í einum.

**Stk. 3.**
Teir ábyrgdarar, ið ikki hava gjørt rætt sín sambært stk. 1 galdandi at umbýta ábyrgdarfæið til partabrøv, og sum ikki hava ynskt at fáa sítt innistandandi ábyrgdarfæ útgoldið kontant, kunnu halda fram sum ábyrgdarar fram til 31. desember 2010, tá ábyrgdarfæið verður útgoldið. Ábyrgdarfæið verður rentað við 1 % omanfyri hægsta rentustig á innláni hjá Suðuroyar Sparikassa P/F á 12 mánaða uppsøgn. Rentan verður tilskrivað hálvárliga, og kemur til gjaldingar einaferð um árið.

**Stk. 4.**

Aðalfundarvaldu nevndarlimirnir í Suðuroyar Sparikassa, sum ikki fara frá á vanliga aðalfundinum í 2006, halda fram í nevndini fyri Suðuroyar Sparikassa P/F, og standa fyri vali eftir sama reglubundna leisti, sum hevur verið galdandi í Suðuroyar Sparikassa fram til vanliga aðalfundin í 2006. Hetta er galdandi til aðalfundurin tekur avgerð um annað við vanligum atkvøðumeiriluta.

Nevndin: